## Stórur munur

**Tað er ógvuliga ymiskt, hvussu nógvar kvinnur venda sær til Kvinnuhúsið millum ár og dag at søkja sær hjálp og ráðgeving.**

**Tølini stuðla upp undir tað, sum Elin Reinert Planck, dagligur leiðari fyri húsið, sigur í aðrari grein her á síðunum og tað er, at í tá ið tíðirnar eru góðar, fær Kvinnuhúsið fleiri áheitanir enn tá ið tíðirnar eru verri.**

**Í talvuni sæst, hvussu nógvar kvinnur hava vent sær til Kvinnuhúsið seinastu sjey árini og, hvussu nógvar av teimum siga, at harðskapur er orsøkin**

| | Áheitanir | Harðskapur |
|---|---|---|
| 2003 | 273 | 96 |
| 2004 | 438 | 112 |
| 2005 | 426 | 138 |
| 2006 | 375 | 188 |
| 2007 | 300 | 119 |
| 2008 | 307 | 142 |
| 2009 | 257 | 100 |

**Tølini niðanfyri vísa, hvussu nógvar kvinnur og børn hava búð í Kvinnuhúsinum**

| | Kvinnur | Børn |
|---|---|---|
| 2003 | 13 | 13 |
| 2004 | 16 | 22 |
| 2005 | 18 | 24 |
| 2006 | 13 | 13 |
| 2007 | 17 | 14 |
| 2008 | 18 | 8 |
| 2009 | 13 | 9 |

# Føroyar dumpa í mannarættindum

**HARÐSKAPUR ÍMÓTI KVINNUM Í ST eru tey ørkymlað av, hvussu lítið Føroyar gera fyri at verja kvinnur ímóti harðskapi**

Áki Bertholdsen

– Føroyar gera ikki nokk fyri at verja kvinnur ímóti harðskapi.

Tað hevur ST staðfest.

Føroyar hava tikið undir við CEDAW sáttmálanum.

Tað stendur fyri "Convention on Elimination of Discrimination Against Women", Hetta verður eisini nevndur Kvinnurættindasáttmálin.

Sostatt hava Føroyar bundið seg til at at liva upp til tey mannarættindakrov, sum hesin sáttmáli ásetur.

Men tað gera Føroyar ikki, staðfesti Jacoba Kruse, aðalskrivari í Amnesty International í Føroyum í almennari hoyring í Miðlahúsinum síðsta mikukvøld um mannarættindi.

Hon staðfestir, at tá ið Føroyar hava tikið undir við sáttmálnum, merkir tað eisini, at ST fylgir við um Føroyar halda hann.

– Tá Cedaw nevndin hjá ST í fjør kannaði um Føroyar livdu upp til ásetingarnar í sáttmálan, var niðurstøðan, at tað verður als ikki gjørt nóg mikið í Føroyum fyri at basa harðskapi móti kvinnum.

– Cedaw nevndin var ørkymlað um at lóggáva manglar í Føroyum við tí endamáli at verja kvinnur móti harðskapi.

– Nevndin var eisini ørkymlað av, at vit ongi hagtøl hava sum vísa, hvussu umfatandi hesin trupulleikin við harðskapi ímóti kvinnum er í Føroyum.

Aðalskrivarin í Amnesty í Føroyum heitti sostatt á Føroyar, um at styrkja arbeiðið við at basa hesum álvarsliga trupulleika og seta í verk eina heildarætlan, har landsins myndugleikar í felag virka fyri at steðga harðskapi móti kvinnum.

Kortini staðfestir hon, at enn hava føroyskir myndugleikar ikki tikið nøkur stig fyri at liva upp til niðurstøðuna hjá Cedaw nevndini.

Tí heita bæði Amnesty International og Kvinnuhúsið á myndugleikarnar um at taka niðurstøðuna til eftirtektar og seta neyugu tiltøkini í verk.

# 245

Higartil í ár hava 245 kvinnur vent sær til Kvinnuhúsið í Havn at biðja um hjálp og ráðgeving. Níggju av teimum hava eru flutt í kvinnuhúsið at vera í styttri ella longri tíð og tilsamans høvdu tey níggju børn við sær.

# 17 menn

Tað eru ikki bara kvinnur, sum venda sær til Kvinnuhúsið. Tað eru eisini einstakir menn, sum venda sær hagar at leita sær ráðgeving. Í fjør vendu 17 menn sær til Kvinnuhúsið. Onkur vildi tosa um, at konan var farin heimanífrá og onkrir høvdu brúk fyri at tosa um trivnaðin hjá børnunum. Men so vóru tað eisini summir, ið vildu fáa samband við kvinnur, ið vóru í húsunum og onkur hevði samlívstrupulleikar, sum hann vildi hava ráðgeving úr Kvinnuhúsinum um. Men so vóru tað eisini nakrir, ið ringdu fyri kvinnur, ið vildu hava hjálp, men ikki hættaðu sær at ringja sjálvar.

# Offrini fyri harðskap fáa ov lítla hjálp

**HARÐSKAPUR ÍMÓTI KVINNUM Føroyskir politikarar mugu nú taka støðu til um teir vilja góðtaka harðskap ímóti kvinnum ella ikki, sigur Elin Reinert Planck, dagligur leiðari í Kvinnuhúsinum**

Áki Bertholdsen

Politikarar í Føroyum gera ikki nógv fyri at hjálpa kvinnum, sum eru fyri harðskapi. Teir gera heldur ikki nógv fyri tey mannfólk, sum eru harðlig.

Tað heldur Elin Reinert Planck, dagligur leiðari í Kvinnuhúsinum.

Tí heldur hon, at nú eiga politikarar at gera støðuna upp og seta altjóða Cedaw sáttmálan í gildi í Føroyum.

Tað er ein altjóða sáttmáli sum staðfestir hvørji rættindi kvinnur hava.

– Verður hesin sáttmálin settur í gildi í Føroyum, er tað ein formlig, politisk staðfesting av, at her verður harðskapur ímóti kvinnum ikki toldur.

– Eg tori næstan at siga, at allir politikarar eru av teirri sannføring, at harðskapur eigur ikki at vera góðtikin. Men teir mangla bara at vísa tað í verki.

– Verður Cedaw sáttmálin settur í gildið fyri Føroyar, hava politikarar staðfest, at harðskapur ímóti kvinnum verður ikki góðtikin.

– So hóast hann sum oftast fer fram innanveggja í heiminum, er talan als ikki um eina privata sak, men um ein samfelagstrupulleika.

### Forpliktar

Men tað forpliktar so eisini politikarar til at seta skipanir og reglugerðir í gildi, sum tekur hond um hendan trupulleikan.

Her hugsar Elin Reinert Planck serliga um lógarverk og sosialar skipanir, sum hjálpa kvinnum, sum hava verið fyri harðskapi og sosialar skipanir, sum taka hond um børn, sum liva í heimum, merkt av harðskapi.

Men hon saknar eisini almenn viðgerðartilboð til menn, sum eru harðligir.

– Harðskapurin steðgar ikki fyrrenn maðurin er givin at sláa og tí er tað eisini ein neyðugur partur í arbeiðnum fyri at steðga harðskapi ímóti kvinnum.

Hon hugsar serliga um, at harðskapur hevur tað við at ganga í arv, soleiðis at skilja, at synir, sum síggja pápa sín brúka harðskap, taka sjálvir til somu metodir, tá ið teir veksa til, so tað er ein ónd ringrás, sum má brótast.

– Tí er neyðugt, at maðurin fer í viðgerð fyri at broyta atferð fyri at koma trupulleikanum til lívs.

Hon saknar eisini, at menn, sum verða dømdir fyri harðskap ímóti kvinnum, í størri mun fáa viðgerðardómar heldur enn at teir bara verða settir í fongsul.

Men sostatt krevjast sosialar fyriskipanir, sum fevna um alla familjuna, sigur Elin Reinert Planck.

Hon sigur, at tað er ikki sagt, at hetta verður so stór útreiðsla fyri samfelagið, tí tað er ein sannroynd, at kvinnur, sum eru fyri harðskapi, eru kosta samfelagnum nógv í sjúkrafráveru og niðursettari arbeiðsorku.

aki@sosialurin.fo